# Heðin Mortensen veit betri

**JÓGVAN VIÐ KELDU**
Løgtingsmaður



Tølini hjá Heðini Mortensen, borgarstjóra í Havn, hava onki við heildarveruleikan at gera. Í høvuðsstaðnum eru langt oman fyri 80 almennir stovnar við meiri enn 800 mió. krónum í lønarútgjaldingum, umframt alt annað virksemi, hetta gevur av sær.

Beint undan páskum hevði Heðin Mortensen, borgarstjóri grein undir heitinum, »Ein hjálpandi hond til Jógvan við Keldu«, har hann skeiklar fatanina av lands- og ríkisalmennu rakstrar- og íløguútreiðslunum, sum í høvuðsheitum bæði beinleiðis og óbeinleiðis í størstan mun fíggja rakstur og íløgur í høvuðsstaðnum. Hann nevnir bara fá endatøl, sum eru úr blokkstuðlinum: Serforsorg, pensjónir og sjúkrahúsverkið. Heðin Mortensen veit fullvæl, at hetta er uttan hald í veruleikanum.

Orsøkin til, at viðmerkingarnar ikki koma fyrr enn nú, er, at so stutt var til páskir, og tí helt eg, at páskafriðurin átti at havast í huga.

Danski blokkstuðulin er 615 mió. krónur, umframt 231 mió. krónur í rakstrar- og løguútreiðslum av ríkisgoldnum stovnum í Føroyum. Harafturat eru krígspensjónir og annað komið. Samlaða upphæddin, sum kemur til landið úr danska ríkiskassanum, er sostatt tilsamans 947 mió krónur.

Vanliga havi eg ikki serstakt hongt meg í danska blokkstuðulin, men í heildarinntøkurnar. Føroyskar og danskar, og hvussu og hvar hesar almennu upphæddir fella aftur í lønum og øðrum rakstri.

Tí fari eg at vísa á, sum Heðin Mortensen veit betur enn nakar annar, at langt yvir 80 almennir stovnar undir landinum liggja í høvuðsstaðnum við meiri enn 800 mió. krónum í útgoldnum lønum. Hesar geva aftur minst 160 mió. krónur í beinleiðis kommunuskatti.

Upp í hetta eru ikki taldar lønir til fólkaskúlan, røktarheim, skip hjá fiskiveiðueftirlitinum ella tól hjá SSL, lønir hjá donskum- ella norðurlendskum stovnum o.s.fr.

Heldur ikki tær vørur, sum verða framleiddar úti um landið og avskipaðar til útflut-nings og vanliga fara yvir bryggjukant hjá Tórshavnar Havn, og soleiðis í stóran mun gera, at avlopið hjá Tórshavnar Havn liggur um 25 mió. krónur árliga, meðan aðrar havnir í Føroyum lítið og einki geva í avlopi.

Eisini eiga vit at hava í huga, at lands- og ríkisalmennir stovnar í høvuðsstaðnum byggja út, byggja nýtt og umvæla fyri yvir 100 mió. krónur um árið.

Umframt hetta vaksa mongu tænastufyritøkurnar uttan um almennu stovnarnir, sum jú eru stórforbrúkarar av almennum, keyptum tænastum.

Við at uppbyggja meiri sterk, fjøltáttaði og samanløgd øki úti um landið, har breiddin av fyritøkum og átøkum eru neyðug, har samfelagsbygnaðurin er samansettur, vinna, mentan, heilsu- og almannaverk og útbúgving, o.s.fr., er eitt dømi økið Klaksvík/Kambsdalur. Tá fært tú samfeldan dynamikk, sum tænir øllum landinum.

At miðsavna í økir gevur eina meining, men at miðsavna alt í eitt einstakt øki, ger av við allan dynamikk. Hetta er vísundaliga prógvað.

Tað kann eisini tykjast løgið, at politikarar í Suðurstreymi geva ilt av sær, bara tí, einir tríggir av yvir 80 almennum stovnum eru lagdir til Miðvágs og Tvøroyrar.

Nei, Heðin Mortensen, gev mær eina »hjálpandi hond« við at flyta stovnar, har teir nátúrliga hoyra heima og geva ein dyggari dynamikk samfelagsliga. Tá fáa vit eitt yvirorðnað sterkt samfelag og ikki sum nú eina linliga menning.

Her verður bæði neyðugt við samaløgdum sterkum økjum, útflyting av almennum stovnum og útjavning av skattakrónunum. Tástaðni fæst eitt visjónsríkt samfelag.

So tølini hjá Heðini Mortensen eru burturvið og onki høpi í. Tað veit hann eisini sjálvur. Eitt danskt orðatak sigur, at: »Den der fortier, lyver også«!

# Tryggingin má ikki sleppa at keypa seg inn í Føroya Banka

**FRÍÐÁLVUR JENSEN**



**- um nakað er í tí ella ikki, skal ein søla ikki beina fyri kappingini á tryggingarøkinum**

Nú nógv er komið undan kavi, og vit ikki rættiliga kunnu skyna á, hvat er eftirfarandi ella ikki, so eru tað kortini ivi, sum eigur at fáast uppá pláss.

Sjálvur eri eg av teirri fatan – eftir at hava starvast á Kalli seinastu fimm árini – at skulu vit bara droyma um nakra veruliga kapping innan eitt nú tryggingar- og teleøkið, er tað ein skylda hjá okkara politiska myndugleika at skipa soleiðis fyri, at lív verður hildið í teirri kapping, sum er komin á økjunum.

Tryggingin skal IKKI keypa!

Tað eigur ikki at vera neyðugt at koma við eini viðmerking sum hesari, men tá eg hoyrdi um, at Tryggingarfelagið Føroyar, saman við øðrum, var ein møguligur keypari av parti av bankanum, fór tað mær kalt oman eftir rygginum.

Føroya Banki eigur P/F Trygd, og er tað veruliga so, at ætlanir eru um, at Tryggingarfelagið Føroyar er við at keypa seg inn í Føroya Banka, er kappingin á tryggingarøkinum farin í søguna. Er hetta ætlanin?

Eg minnIst, at tá liberaliseringin innan tryggingarøkið varð framd á sinni, vóru nógvar kreftir innan Tryggingina, ið royndu at beina fyri hesum. Tí er hetta kanska ein roynd at fáa gjørt tað soleiðis, at vit nú aftur skulu verða bumbaði aftur í monopoltíðina, tá tað vóru monopolpávarnir, sum settu dagsskránna!

Avgerðin er TYKKARA!

Eg fari heita á okkara politiska myndugleikan at steðga á og gera sær greitt, hví bankin skal seljast.

Tit hava júst gjørt av, at tað verður ongin søla framd av Føroya Tele í hesum valskeiðnum, so kanska áttu tit líka at steðga á, so allur ivi kann beinast av vegnum í sambandi við søluna av Føroya Banka.

Eg taki fult undir við allari liberalisering, men hon skal bara ikki beina fyri kapping á øðrum økjum!

# Tíðin er farin frá staðbundnum nevndum

**ANNFINN BREKKSTEIN**
www.brekkstein.com



Tórshavnar býráð eigur til komandi val at taka av tær staðbundu nevndirnar, sum eru í øllum bygdunum, ið hava lagt saman við Tórshavnar kommunu. Tíðin er farin frá hesum nevndum, sum í dag at kalla bert gera mismun á borgarum í kommununi.

Hesar nevndir vóru partur av samanleggingarsáttmálunum, sum vórðu gjørdir, og endamálið við teimum var tá,at tær skuldu kunna, ráðgeva og vegleiða býráðnum í ymsum málum. Men nú hevur hetta fyribrigdi útspælt sín leiklut, og ásannast má, at tíðin er farin frá hesum nevndum.

Skulu allir borgarar fáa eins viðferð, so skulu fólk í ymsu býarpørtunum í Havnini eisini hava staðbundnar nevndir, so tey hava sama møguleika at kunna, ráðgeva og vegleiða, hvørja ferð okkurt hendir í teirra nærumhvørvi, ið hevur uppiborið viðgerð á sama hátt, sum tá okkurt hendir í bygdunum í kommununi.

Tað stendur einum og hvørjum greitt, at skal ein slík javnvág gjøgnumførast, so fáa vit eina endaleysa røð av staðbundnum nevndum, og tað er væl ikki meiningin. Spurningurin er eisini, um hesar nevndir eru objektivar og siga fólksins meining, ella um tær eru subjektivar og merktar av eintáttaðum og snævurskygdum meiningum, sum tær ikki tæna fjøldini, men bert ávísum borgarum.

## Tarnandi millumlið

Ein annar spurningur er eisini, um hesar nevndir ikki bert eru eitt tarnandi millumlið, ið ger sítt til, at nógv mál verða nógv seinni avgreidd, enn tey annars høvdu verið. Um eitt nú ein umsókn kemur av Velbastað, so skal staðbundna nevndin siga sína hugsan, áðrenn málið verður sent víðari til fyrisitingina, sum síðani beinir tað í nevnd.

Øll henda tilgongdin kann lættliga taka eitt hálvt ár, meðan tað gongur munandi skjótari, um talan er um borgarar í Havn, sum ikki skulu umvegis eina staðbundna nevnd. Kemur ein umsókn frá einum havnarborgara, so kann málsviðgerðin byrja beinanvegin í viðkomandi nevnd hjá Tórshavnar býráði.

Vit kunnu sostatt staðfesta, at her verða borgararnir ikki viðgjørdir eins og fáa ikki somu rættindi, men í staðin er viðgerðin tengd at, um tú býrt í einari av bygdunum ella í sjálvari Havnini. Tí er púra greitt, at staðbundnu nevndirnar als onga nyttu gera og eiga at verða tiknar av, tí fólkavaldu býráðslimirnar eru jú valdir til at umboða alt fólkið í nýggju Tórshavnar kommunu, óansæð hvar í kommununi tú býrt.

Allir borgarar í teimum gomlu kommununum, sum hava lagt saman við Tórshavnar kommunu, eru nú borgarar við somu rættindum og somu skyldum sum hinir allir aðrir borgarar í kommununi. Tí veruleikin er jú, at bygdirnar í dag eru ein býlingur í Havn!

# Flaggdagsrenning í Vági

**Skipað verður fyri flaggdagsrenning í Vági flaggdagin. Hetta er fyrstu ferð, at skipað verður fyri flaggdagsrenning í Vági. Tað er Ítróttarfelagið "Hvistan", ið skipar fyri tiltakinum**

RENNING
dagfinn@sosialurin.fo

Byrjað verður við Framtíðina kl. 13.30, har luttakararnir eisini møta. Runnið verður oman á niðaraveg, vestur í Bø og rundan um vatnið, niðan við hjá Eyðfinn Mørk og niðan á Foss, út í Toftar og oman ígjøgnum Toftabrekku, út á vendiplássið á Gartnaroyri og síðan eftir niðaraveg vestur aftur til Framtíðina. Strekkið er uml. 5 km. Børnini renna bert hálvan teinin.

Kappingin er fyri børn og vaksin. Gjørt verður vart við, at øll – ung og eldri, skjót og minni skjót – eru vælkomin. Fólk vælkomin at ganga allan teinin.



Tá komið er á mál, fáa allir luttakararnir frukt, sunkist og kaffi.

Heiðursmerki verður latið nr. 1,2 og 3 í hvørjum bólki, og teir eru:

Veteranar 45 ár og eldri
Vaksin 21 og 44 ár
Ung árg. 87-90
Ung árg. 90-95
Ung árg. 94-96
Børn árg. 97-2000

Gentur og dreingir kappast ikki ímóti hvør øðrum.

Luttøkugjaldið er 30 kr fyri vaksin og 10 kr fyri børn, og tilmeldingin fer fram í Framtíðini millum kl 12.00 og 13.15.

Saman við startnummarinum, verður latið eitt gávukort frá Bailine í Vági v/ Karin Strøm, til allar kvinnur 18 ár og eldri.